## UTTAN ÚR HEIMI

## Í hernað ímóti heroini

Amerikonsku myndugleikarnir hava nú sett sær fyri at steðga tí stóra rúsevnisflutninginum úr Afganistan.

Í tí sambandi hevur Kongressin í Washington játtað meiri enn fýra milliardir krónur, og ætlanin er at brúka pengarnar til at fáa afgansku bøndurnar til at dyrka annað enn opium. Í fyrsta lagi skulu amerikanskir hermenn hjálpa afgansku løgregluni at forða rúsevnisflutninginum um markið. Á tann hátt fer tað at verða truplari hjá bøndrunum at sleppa av við grøðina, og so skulu pengar brúkast til at fáa teir at dyrka okkurt annað ístaðin fyri.

Amerikanska herleiðslan í Afganistan hevur sagt, at rúsevnistrupulleikin er eitt tað størsta vandamálið í landinum. ST heldur, at afgansku bøndurnir heysta umleið 3.400 tons av opium í ár, og tað er meiri enn í nøkrum øðrum landi í heiminum. Ein stórur partur av pengunum endar í lummunum hjá teimum sokallaðu krígsharrunum, sum við sínum vápnaðu liðum eru ein hóttan ímóti myndugleikunum í Kabul.

## Taka lívið av sær

Russiska tíðindastovan Interfax skrivar, at meiri enn 500 russiskir hermenn hava tikið lívið av sær ella eru deyðir av vanlukkum í ár. Tað merkir, at herurin missir fleiri hermenn av sjálvmorði og vanlukkum enn í bardaga.

Sergei Ivanov, verjumálaráðharri hevur sambært Interfax sagt, at meiri enn 900 russiskir hermenn eru deyðir higartil í ár. 423 eru deyðir í tænastu, men 509 doyðu fyri egnari hond ella av vanlukku. Mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch skrivaði í einari frágreiðing í oktober, at ungir hermenn verða so illa viðfarnir í herinum, at nógvir velja at taka lívið av sær, og fleiri túsund aðrir flýggja úr legunum.

Sergei Ivanov avsannaði tað, sum stóð í frágreiðingini, men sambært Interfax hevur hann nú biðið herleiðsluna síggja til, at broyting kemur í.

## Prísir skulu kannast

Kappingarmyndugleikarnir í Noregi fara nú at kanna, hvussu tað ber til, at matvørur eru nógv dýrari í Noregi enn í ES-londunum.

Ein kanning hjá kappingarráðnum hevur avdúkað, at matvørurnar kosta umleið 50 prosent meiri í norskum handlum enn í ES-londunum, og at í meðal eru prísirnir í Noregi umleið 26 prosent hægri enn í grannalandinum Svøríki. Sambært NRK hevur kappingarráðið illgruna um, at kappingin á matvørumarknaðinum er ov lítil, og at tað er orsøkin til teir høgu prísirnar.

– Vit vita, at norski sertollurin á matvørum er høgur, men tað er ikki øll frágreiðingin, sigur kunningarstjórin í kappingarráðnum, Signe Horn, við NRK og leggur afturat, at kappingarráðið er serliga ørkynmlað av, at tað er so dýrt at keypa fisk og kjøt í Noregi. Eitt nú eru fiskavørur munandi dýrari í Noregi enn í Finnlandi, sigur hon.

## Innrás í Kairo

Grashoppurnar, sum seinastu tíðina hava oyðilagt meginpartin av grøðini í fleiri vestur- og norðurafrikonskum londum, eru nú eisini komnar til Egyptalands.

Mikudagin var so tjúkt av grashoppum í luftini yvir Kairo, at sólin hevði ilt við at sleppa ígjøgnum. Myndugleikarnir høvdu fyrireikað seg til teir óbodnu gestirnar og høvdu sett eld á bildekk fyri at jagstra grashoppurnar burtur. Samstundis vórðu serligir bilar sendir avstað at spræna flogkykteitur upp í luftina.

Grashoppurnar hava oyðilagt nógva grøði í Mali, Mauritania, Niger og Senegal, men tær hava eisini gjørt um seg í Algeria, Libya og nú í Egyptalandi. Sjálvt ikki havið kann forða teimum, tí í heyst hava sjáldsama nógvar grashoppur verið á Kýpros. Serfrøðingar siga, at hesar grashoppurnar kunnu gerast ímillum sjey og átta centimerar langar, men at tær eru ikki vandamiklar fyri fólk.

# Vilja hava at vita hví Arafat doyði

**Palestinsku myndugleikarnir vilja hava greiði á, hvørjum Yasser Arafat doyði av**

DEYÐSORSØK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Nú skal greiði fáast á, hví palestinski leiðarin, Yasser Arafat, doyði.

Ahmed Qurie, forsætisráðharri, segði í gjár, at hann hevur givið einari nevnd boð um at kanna deyðsorsøkina. Nevndin skal tosa við palestinskar og aðrar læknar fyri at gera enda á teimum nógvu gitingunum, sum hava verið, síðani Arafat varð fluttur á eitt hernaðarsjúkrahús í París, har hann doyði nakrar dagar seinni.

Longu meðan Arafat lá á Percy-hernaðarsjúkrahúsinum, gingu søgur um, at hann var vorðin eitraður. Fronsku læknarnir hava sýtt fyri at almannakunngera deyðsorsøkina, og einkjan, Suha, sum hevur fingið eina frágreiðing frá læknunum, hevur heldur ikki viljað sagt nakað um tað. Ahmed Qurie segði í gjár, at tann serliga kanningarnevndin skal eisini til Fraklands fyri at fáa greiði á, hví Arafat doyði.

Palestinski uttanríkisráðharrin, Nabil Shaat, hevur fyrr avsannað, at Arafat var eitraður, men tað hevur ikki steðgað gitingunum, skrivar AP.



*Var Yasser Arafat eitraður? Tað kal nú kannast*

# Arabarar í øðini um fangamorðið í Fallujah

**Myndirnar av amerikanska hermaninum, sum drepur ein særdan iraka, hava fingið øði í nógvar arabar og kunnu eggja til harðari mótstøðu ímóti USA**

FANGAMORÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Meðan tey flestu vesturlendsku sjónvørpini valdu at klippa ein part av myndunum burturúr, valdi arabiska sjónvarpið Al-Jazeera at vísa allan tilburðin i moskuni í Fallujah.

– Vit vísa ikki myndir av sivilfólki, sum verða hálshøgd ella avrættað á annan hátt. Men her er talan um eitt morð, sum hevur beinleiðis samband við kríggið, og tá er markið øðrvísi, sigur talsmaðurin já Al-Jazeera, Jihad Balut, við Reuter.

Myndirnar hjá Al-Jazeera hava elvt til øsing víða hvar í tí arabiska heiminum. Á gøtuni í jordanska høvuðsstaðnum Amman fekk tíðindastovan AP at vita, at amerikanararnir eru brotsmenn, og Reuter skrivar úr Dubai, at hatta var ikki tað, sum arabarar høvdu væntað sær av teimum, sum siga seg umboða tann demokratiska heimin.

Fyrr hava nógvir arabarar funnist at iraksku mótstøðumonnunum, ti teir brúktu moskurnar sum verjustøðir, men at amerikanararnir avrætta ein krígsfanga í einum av teimum halgu húsunum er teimum ovboðið.

Arabiska blaðið Al-Sharq Al-Awsat samanbar tilburðin í moskuni í Fallujah við tað, sum hendi í Abu Ghraib-fongslinum í Bagdad. Blaðið vildi vera við, at tilburðir sum hesir máa støðið undan amerikanska páhaldinum um, at teir eru komnir til Irak við demokratii og rættvísi.



## Fór niðan av vegnum

Á Kaldbaksvegnum hendi eitt ferðsluóhapp orsakað av hálkuni tíðliga hósmorgunin. Ein bilførari, ið var á veg til Havnar, misti brádliga tamarhaldi á bilinum. Bilurin fór runt, og slongdist so niðan av vegnum. Vakthavandi sigur, at eingin fólkaskaði hendi, men bert smávegis materiellur skaði.

**– eys –**



*Savnsmynd*

## Trailari stóð tvørur

Á Hvítanesvegnum kom ein trailaraførari illa fyri tíðliga hósmorgunin. Hann kom koyrandi framvið Skógrøkt Landsins í Havn og skuldi niðan á Ringvegin. Men í brøttu brekkuni, beint áðrenn Ringvegin byrjaði trailarin at glíða.

Vakthavandi sigur, at talan var um ein stóran trailara, við einum føraravogni og einum stórum anhangara aftanfyri. Trailarin gleið spakuliga aftureftir, til hann at enda steðgaði, og stóð tvørur um vegin. Lukkutíð rakti trailarin ongan bil. Vakthavandi veit at siga, at tað loysti seg sjálvt, uttan hjálp, men at bilrøðin var ógvuliga long. Heilt niðan til Hvítanes.

**– eys –**

## Smávegis óhapp

Í Klaksvík sigur vakthavandi, at seinnapartin í gjár vóru tvey smávegis ferðsluóhapp orsakað av hálkuni. Hann sigur, at tað tó ikki var nakað serligt at tosa um, tí bert smávegis skrokkskaði hendi. Hann leggur afturat, at síðani týsdagin kl 17 hevur einki verið at frætt. – Í dag síggi eg, at nógv lata bilin standa og fara heldur til gongu, sigur hann.

**– eys –**

## Trupulleikar við Norðskálatunnilin

Løgreglan í Eysturoy sigur, at tað seinnapartin í gjár kom rættiliga nógvur krapi á vegin, og tað elvdi til trupulleikar. Serliga vestaru megin Norðskálatunnilin. – Tá tað er nógvur vindurin og krapi, verður vegurin líkasum slípaður, soleiðis at bilarnir lítið og einki vegtak fáa. Tað ger, at serliga teir bilar sum eru illa skøddir fara tvørir, greiðir vakthavandi frá.

Hann sigur, at tað eisini eru nógvir stórir, tungir bilar, ið koma í trupulleikar.

– Tá bilarnir einki vegtak hava, samstundis sum tað er nógvur vindur, eru fleiri bilar, ið verða tiknir við vindinum. Tíbetur hendi einki álvarsamt óhapp í gjár, men tað vóru fleiri ið komu í trupulleikar, sigur vakthavandi í Runavík. Hann leggur afturat, at tá tað varð saltað vóru eingir trupulleikar longur.

– Av og á hevði tað verið gott um teir hjá Landsverk høvdu verið eitt lítið sindur fyrr við saltinum, soleiðis, at vit sluppu undan øllum smásnuddunum ið henda inntil teir koma. Um teir líkasum kundi hjálpt til at sloppið undan ferðsluóhappum, áðrenn tey henda. Men teir hava sjálvandi nógv annað at takast við, heldur vakthavandi.

Hann sigur, at júst á strekkinum vestan fyri Norðskálatunnilin henda tey flestu ferðsluóhappini um veturin.

**– eys –**

## Á Gøtueiði

Eisini á Gøtueiði vóru trupulleikar av hálkuni mikudagin seinnapartin, tá tað frysti. Har var sama skilið við krapa og nógvum vindi. Har er eisini rættiliga trongt á vegnum, soleiðis at bilarnir verða noyddir at halda av fyri hvørjum øðrum. – So kanst tú ímynda tær hvussu skilið verður, tá tað er hált, og bilarnir hvørki fáa bremsað ella stýrt ordiligt, sigur vakthavandi og leggur afturat, at heldur eingin álvarsamur skaði hendi har.

Eisini á Gøtueiði hvurvu trupulleikarnir, tá Landsverk hevði saltað.

**– eys –**

## Fyrilestur um Runeberg

**Mikukvøldið 24 november skipar Norrøna Felagið fyri verð einum almennum fyrilestri um fyrsta, stóra, finska skaldið, Johan Ludvig Runeberg**



Í ár eru 200 ár liðin, síðani Johan Ludvig Runeberg varð borin í heim. Hann andaðist í 1877, 73 ára gamal.

Tað, sum er serstakt við Runeberg, er, at hann var fyrsta mikla skaldið í tí sjálvstøðuga Finnlandi. Eitt sitat, sum Runeberg varð kendur fyri var hetta: »Blanda enn til helvtar bark í breyðið«

Hann skapti tjóðskaparligar myndir av finska fólkinum, einum fólki, ið tað ber til at vera stolur av. Hann var somuleiðis fyrstur at bera fram tey finsku eyðkennini hjá fólki og nattúru.

Runeberg lyfti eisini finska søgu og gav finska fólkinum eina fortíð at vera góð við.

Runeberg yrkti á svenskum.

Norrøna Felagið í Føroyum minnist Runeberg við einum almennum fyrilestri á Landsbókasavninum mikukvøldið 24. november kl 19.30.

Turið Sigurðardóttir, bókmentafrøðingur, heldur fyrilesturin, sum hon kallar »Runeberg og norðurlendskur romantikkur«.

**eys –**

LM handilin er við á sølustevnuni í Runavík 'MARKO 2004'
*leygardagin 20. og sunnudagin 21. nov.*
*Vit sýna fram vørur frá:*




*Í sambandi við hetta er LM-handilin stongdur leygardagin 20. nov.*
HANDILIN
Básur nr. 20
LM-Handilin · Hoyvíksvegur 53 · Tel 35 12 20 · Fax 35 12 30